

## Ferðamenn smugla fisk

Tollvaldið í Noregi hevur støðugt veksandi trupulleikar av stuttleikafiskimonnum, sum royna at sleppa av landinum við meiri fiski, enn reglurnar loyva. Millum annað hevur tollvaldið við svenska markið lagt hald á rættiliga nógvan fisk í seinastuni. Fiskeribladet skrivar, at tær báðar seinastu vikurnar hava tollararnir lagt hald á 651 kilo av skræðuleysum og beinleysum toskaflaki, sum svara til meiri enn tvey tons í rundari vekt. Tollvaldið sigur, at tað eru yvirhøvur týskir og estlendskir stuttleikafiskimenn, sum royna at sleppa av landinum við flakinum.

# Merkja lítið og einki til arbeiðsloysi



*- Umframt alt fólkið, sum starvast í fiski-og framleiðsluvinnuni og øðrum vinnum við tilknýti til hesar, ganga vestmenningar eisini frammarlaga í eitt nú ferðavinnu, sigur borgarstjórin, Karl A. Olsen*

**Í Vestmanna er nógv og fjølbroytt vinnulív. Feløg í bygdini eiga skip og bátar, nógvur fiskur verður virkaður á landi, og í bygdini eru eisini onnur vinnulig virki, sum eitt nú Vestpack, maskinverkstaður, bilaverkstaður og lutfalsliga stór ferðamanna-og tænastuvinna**

VESTMANNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tølini, sum vísa skattainntøkurnar hjá Vestmanna kommunu fyrstu fýra mánaðirnar í ár, benda ikki á, at bygdin er rakt av arbeiðsloysi. Tvørtur ímóti er líkt til, at vestmenningar sum heild hava nóg mikið at taka sær fyri.

Borgarstjórin í Vestmanna kommunu, Karl A. Olsen, heldur ikki, at tey síggja nakað serligt til arbeiðsloysi í bygdini.

- Eg skal ikki siga, at eg ikki havi hoyrt um onkran vestmenning, ið hevur arbeitt aðrastaðni, sum er vorðin arbeiðsleysur. Vit vita eisini, at virksemið hjá byggivinnuni er minkað, tó at timburmeistarar kortini framvegis hava nakað at gera, men eg haldi ikki, vit kunnu siga, at okkara bygd higartil er rakt av arbeiðsloysi.

### Koma til bygdar

Borgarstjórin vísir á, at fleiri fólk koma úr øðrum bygdum til Vestmannar at arbeiða, eitt nú til fiskavirkið hjá Faroe Seafood, sum vísir seg at hava nógv virksemi.

- Haraftrat hevur tað altíð verið soleiðis, at nógvir avbygdarmenn eru við skipunum, sum eru heimahoyrandi her hjá okkum.

Hann heldur tó ikki, at vestmenningar ganga arbeiðsleysir av hesi orsøk.

- Nei, eg haldi, at tey allar flestu hava nóg mikið at taka sær fyri, og herfyri byrjaði Atlantis eisini at arbeiða gulllaks aftur. Hetta er vertíðararbeiði, sum er í gongd í summarhálvuni.

### Stór ferðavinna

Karl A. Olsen vísir á, at umframt alt fólkið, sum starvast í fiski-og framleiðsluvinnuni og øðrum vinnum við tilknýti til hesar, ganga vestmenningar eisini frammarlaga í ferðavinnu.

- Ferðavinna hevur eisini nakað av tænastuvinnu við sær, og soleiðis hava vit eisini støð á landi, sum veita útlendingum og føroyingum, sum dáma at ferðast, nøkur tilboð.

Borgarstjórin leggur aftrat, at í Vestmanna er stórur skúli við framhaldsdeild, fiskivinnuskúli og arbeiðspláss eru eisini á eldrasambýli og dagstovni.

- Men, sum eg nevndi í áðni. Her er nógv virksemi til okkara egnu borgarar, umframt at stórt tal av fólki, sum býr aðrastaðni, eisini hevur sítt livibreyð í Vestmanna, sigur Karl A. Olsen.

# Fara at taka støðu til røktarheim

**- Vit arbeiða framvegis við ætlanunum um at byggja eitt røktarheim á Grønanesi, har vit leingi hava havt eitt økið til endamálið. Bygdarráðið fer í næstum at taka støðu til, hvussu fram skal farast, sigur borgarstjórin í Vestmanna**

VESTMANNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tó at tíðirnar knappliga eru broyttar, hava vestmenningar ikki slept ætlanunum um at byggja eitt røktarheim í bygdini. Kortini ætlar kommunan sær ikki at leypa fram av, nú vánirnar á ymiskan hátt eru øðrvísi, enn tær hava verið.

- Vit eru millum tær bygdir og býir, sum hava fingið lovað stuðul til bygging av einum røktarheimi. Lógin er broytt, soleiðis at landskassin nú rindar 700.000 krónur av íløguni fyri hvørt búpláss. Áður var ískoyti úr landskassanum ein hálv miljón fyri hvørt búpláss.

Karl A. Olsen, borgarstjóri í Vestmanna, vísir á, at heimið, sum vestmenningar hava fingið teknað, rúmar 24 fólkum.

- Metti kostnaðurin hevur verið einar 50 miljónir krónur, men soleiðis, sum tíðirnar eru í dag, og byggivinnan hugsandi er eitt sindur "svangari", høvdu vit kanska fingið heimið upp fyri einar 40 miljónir krónur.

Borgarstjórin vísir á, at sitandi bygdarráð fer at taka støðu til hetta mál einaferð í summar, og tá fer kommunustýrið eisini at viðgera og taka støðu til eina langtíðar raðfesting av íløgum í kommununi.

- Økið til eitt røktarheim er lagt av á Grønanesi, og har er faktiskt alt klárt. Koma vit til ta niðurstøðu, at heimið skal byggjast, og verkætlanin annars kann fíggjast, er so gott sum klárt at bjóða arbeiði út.

Karl A. Olsen ásannar, at um kommunan fer undir hesa verkætlan, er hon so stór og kostnaðarmikil, at onkrar aðrar íløgur, sum liggja fyri framman, mugu strekkjast yvir eitt sindur longri tíðarskeið.

- Tørvurin á einum røktarheimi minkar ikki, tó at vit hava eldrasambýli í bygdini. Vit bíða nú eftir, um peningurin gerst tøkur, og vit bíða eisini eftir, hvørjar uppgávur landið ætlar, at kommunurnar skulu átaka sær. Í triðja lagi vita vit heldur ikki við vissu, hvussu landsstýrið ætlar, at kommunurnar skulu síggja út frameftir, sigur borgarstjórin í Vestmanna.